Credo á Summar Festival:

# Lekkur gospelrokkur á skránni

**Bólkurin, sum spældi fyrstu uttandura konsertina á Summar Festivalinum nakrantíð, verður nú aftur at hoyra á festivalinum í Klaksvík.**

TÓNLEIKUR
*Ragnhild Ellingsgaard*

Ein leygardag seinnapart fyri fimm árum síðani fóru nakrir ungir tónleikarar á pallin á Vágsbøi og spældu fyrstu uttandura konsertina nakrantíð saman. Nógv er hent síðani góðveðursdagin í 2004 og nú verður bólkurin Credo aftur at hoyra á Summar Festivalinum.

Credo er í dag ein tann besti gospelrokkbólkurin í Føroyum. Teir spæla nýmótans rokktónleik og leggja dent á at hava góð løg og viðkomandi tekstir.

Fýra tónleikarar manna Credo. Teir hava allir verið við í bólkinum, síðani fyrstu fetini vóru tikin í 2003, tá bólkurin var við til Gospelprixið. Síðani hevur Credo spælt til nógv ymisk tiltøk, og teir hava eitt nú havt frálíkar framførslur á Fjarðafestivalinum.

Nú verða teir so aftur at hoyra á festivalinum, har teirra stóru framførslur byrjaðu fyri fimm árum síðani.

Manningin í Credo er hendan: Hans Andrias Olsen, Alvin Ellebye Andersen, Leivur Vitalis og Rógvi Sivertsen.





FAROE 5 á Summar Festival:

## Betri enn nakrantíð áður

TÓNLEIKUR
*Ragnhild Ellingsgaard*

FAROE 5 er eitt heitt navn í føroyskum popptónleiki. Hóast tað er liðið eitt ár, síðani fyrsta fløgan hjá teimum kom út, verða genturnar framvegis tráðspældar í føroyskum útvarpi, og Faroe 5 hevur mest sum verið fast inventar á 15 teimum bestu, sum er hitlistin hjá teimum ungu.

Fimm ungar kvinnur manna FAROE 5. Tær vórðu valdar eftir almenna upptøkuroynd, har nógvar evnaríkar kvinnur bjóðaðu seg framman. Valið fall á Jónvá, Lillian, Astu, Ragnhild og Vígdis.

Sangurin Bara 1 Spæl gjørdist stóra gjøgnumbrotið hjá FAROE 5, men síðani hava sangir sum Eina Langa Nátt og Tell Me Now verið stór hitt í Føroyum.

Og FAROE 5 hava spælt eina ørgynnu av konsertum, síðani tær tóku fyrsta stigið inn á føroyska tónleikapallin. Bólkurin er betri live enn nakrantíð áður, og genturnar í FAROE 5 eru til reiðar við einum ordans konsertbraki á Summar Festivalinum, sum verður um bara nakrar heilt fáar dagar.

Høgni Lisberg á Summar Festival:

## Lekkur drongur og feitar rútmur

**Hann skrivar og spælir egnan tónleik, sum hittar bæði í Føroyum og uttanlanda – og so er hann maðurin aftan nakrar av teim bestu pallframførslunum, vit nakrantíð hava sæð í Føroyum. Tí verður Høgni Lisberg sjálvandi aftur á skránni hjá Summar Festivalinum.**

TÓNLEIKUR
*Ragnhild Ellingsgaard*

Tað er nógv vatn runnið í ánna, síðani Høgni Lisberg sat og bukaði trummur í legendariska rokkbólkinum Clickhaze. Síðani hann slepti trummustikkarunum hevur hann ment seg til ein tann besta og mest umbidna føroyska tónleikaran nakrantíð – og hetta er sjálvandi ikki uttan orsøk.

Høgni Lisberg er ikki bara góður í upptøkuhølunum og á fløgu; hann er eisini maðurin aftan eina av teim bestu framførslunum nakrantíð á Summar Festivalinum. Hetta var, tá Høgni spældi í tjaldinum fyri tveimum árum síðani.



Og nú er hann aftur á skránni hjá Summar Festivalinum, so í august ber  aftur til at uppliva eitt tað feitasta føroyska tónleikanavnið rokka á føroyskum festivalpalli.